# Friðaligt vikuskifti

**Vikuskiftið var friðaligt, verður sagt av politistøðunum kring landið. Tó hava bilarnir í Suðurstreymoy í ov stóran mun hug at koyra, uttan at eigarin veit av**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Edvard Joensen*

Løgreglan sigur, at Vikuskiftið var friðaligt. Í Eysturoynni var okkurt smávegis í samband við nógva fólkið, sum komið var saman til Prix Føroyar undankappingina í Fuglafirði. Og í Havn siga tey, at onkrir bilar vórðu stolnir, og onkur annar illa viðfarin. Annars siga poltitistøðirnar ikki frá nøkrum óvanligum.

Løgreglan í Havn sigur, at tey fingu nakrar fráboðanir um bilstuldur bæði í Havn og á Velbastað. Í Øllum førum komu bilarnir aftur. Onkunstaði hevði lykilin helst staðið í, men á Velbastað var farið inn í eini sethús eftir lyklinum, áðrenn bilurin varð tikin.

Ein maður, sum ætlaði sær í Tórshøll um vikuskiftið, slapp ikki inn, og tað dámdi honum ikki. So illa nøgdur var hann, at hann kvittaði við at gera seg inn á bilin hjá duravørðinum. Sagt verður av politistøðini í Havn, at hann soraði bilin sundur. Løgreglan kom uppí, og maðurin selppur at gjalda skaðan aftur.

Onkur varð tikin fyri at koyra ávirkaður, men eingin hevur sovið á politistøðini í Havn um vikuskiftið. Onkunstaðni fóru fólk at klandrast innanhýsis, og løgrelgan varð boðsend.

Trolarin Grímur Kamban, sum fríggjadagin kom fyrstu ferð á Havnina úr Íslandi, fekk eina blandaða móttøku. Fyrst við blómuheilsanum og góðynskjum, men longu um vikuskfiti var onkur, sum breyt inn og legðist á medisinkistuna, sigur løgreglan í Havn.

Av Løgreglustøðini í Eysturoy verður sagt, at vikuskiftið var friðaligt, hóast heilt nógv fólk var á ferð í samband við Prix Føroyar í Fuglafirði.

Eini fýra smærri ósemjur vóru, sum løgreglan kom uppí, og fólk fáa bót fyri brot á politiviðtøkurnar. Annars er einki at siga um tað, sigur løgreglan. Einki harðskapsmál spurdist burtur úr tí.

Ein bilførari varð tikin fyri at kopyra fullur við einum stolnum bili. Og koyrikort hevði hann heldur ikki, so hann sleppur ikki undan ákæru.

Annars var nógv ferðsla bæði við persónbilum og bussum, og løgreglan kannaði javnan ferðsluna. Einir fýra bilførarar fáa eina heilsan fyri at hava koyrt ov skjótt, men eingin so skjótt kortini, at vandi er fyri koyrikortinum.

# Rannsaka rannsóknarskipið

**Næmingar í framhaldsdeildnunum í føroysku skúlunum sleppa nú umborð á Magnus Heinason at síggja, hvørjar rannsóknir verða gjørdar umborð**

KANNINGARFERÐ
*Edvard Joensen*



*Næmingarnir fylgdu við áhuga við, meðan fiskifrøðinguirn greiddi frá ymsu, og stundum løgnu fiskunum, sum fingnir eru undir Føroyum*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Miðvági:**
Magnus Heinason er farin á rundferð til ymisk pláss í landinum, har skúlanæmingar í framhaldsdeildunum verða bodnir umborð at síggja skipið og hoyra, hvat gjørt verður umborð á einum rannsóknarskipi.

Tey fylgja við áhuga við tí, sagt verður, meðan fiskifrøðingurin vísir teimum, hvussu ein fiskur verður vigaður og máldur. Innvølurin skal takast úr, og innihaldið í maganum kannast.

Tíggjundi flokkur á Giljanesi er umborð á Magnusi Heinasyni, nú hann sum fyrsta staðið á rundferðini liggur á Miðvági.

Tikið varð í móti næmingunum beinanveg við landgongina, har tey sóu ymisk tól, sum brúkt verða til at draga gjøgnum sjógvin fyri at fáa hendur slíkum, sum svimur og rekur í sjónum.

Tey hava sett ymsar støðir upp skipinum, sum næmingarnir verða fluttir framvið, meðan fólk frá skipinum greiðir frá, hvat alt verður brútk til, og hvørji úrslit fáast burturúr. Mátingar av sjógvi og tí, sum í sjónum er, merking av fiski, og laboratoriekanningar, sum millum annað vísa, hvat tað var, togað varð upp úr sjónum í teimum posunum, næmingarnir sóu, fyrsta tey komu umborð.

Eitt modell av einum troli er eisini spent út á dekkinum og nakrir pappírsfiskar eru lagdir frammanfyri, so tey fáa eina hilling á, hvussu hesin reiðskaður virkar.

Niðri á millumdekkinum liggja eisini fiskar av ymsum slagi, sum Magnus Heinason hevur fingið á rannsóknarferðum undir Føroyum. Óvanligir fiskar soleiðis at skilja, at tað fyri tað mesta er fiskur, sum fingin verður á djúpum vatni. Tó er onnkur, sum ferðast nærri landi, eisini við. Og eyðsæð er, at hesum dámar næmingunum væl at hyggja at og fáa at vita, hvørjir hesir fiskarni eru.

Men tað krevst eisini annað enn bara royndirnar sjálvar, fyri at fáa skipið at sigla og finna fram til tað, sum royndir skulu takast av. Og rannsóknarferðin hjá skúlanæmingunum umborð á rannsóknarskipinum endar á brúnni, har tey sleppa at síggja øll tólini, sum krevjast at hava umborð á einum slíkum skipi í dag.

# Sørvágs Laks hevur keypt smoltstøð

**Sørvágs Laks hevur keypt meirilutan av partabrøvunum í smoltstøðini Dalá Smolt í Norðradali. Eisini alistøðin Hólmalaka við Gomlurætt er við í keypinum**

*Sørvágs Laks hevur keypt partabrævameirilutan í Dalá Smolt í Norðradali og Hólmalaks, sum liggur við Gomlurætt*



ALING
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Sørvágs Laks hevur keypt meirilutan í smoltstøðini í Norðradali. Grundin er tann, at felagið við tryggja sær nóg mikið av smolti til alingina á Sørvági, sigur stjórin.

Gardar Joensen, stjóri á Sørvágs Laksi, sigur, at Sørvágs Laks hevur keypt 55 prosent av partapeninginum í Dalá Smolt. Eisini fylgir alistøðin Hólmalaks, sum liggur við Gomlurætt, við í keypinum. Hinir partaeigararnir eru Havsbrún, sum eigur 40 prosent, meðan norðradalsmenn eiga hini fimm prosentini.

Gardar Joensen sigur, at fyri Sørvágs Laks merkir tað onga broyting sum so, at felagið nú eigur egna smoltstøð, tí tey hava í áravís fingið mestsum alt sítt smolt frá Dalá Smolti.

– Tó kann tað vera ein ávísur tryggleiki í at vita, at vit á hendan hátt altíð hava trygga tilgongd av smolti, sigur hann.

Hann sipar til, at í løtuni er yvirskot av smolti á marknaðinum, tí minni er sett út seinnu tíðina, enn vanligt hevur verið. Tað kann so aftur fara at gera, at onkur støð í framtíðini fer at trappa niður og ikki fer at hava nokk av smolti. Tá er gott at kunna hava sítt egna, sigur Gardar Joensen.

Tað fer ikki at mekrja nakra broyting fyri arbeiðsfólkið á støðunum, at partapeningurin skiftir eigara, sigur Gardar Joensen.

<ph_1>

ÚTSØLU ENDABRESTUR
Nú verða allar útsøluvørur seldar fyri - 75 %
VEST MÓTI
Vestmanna • Tel. 42 44 07
KOMIÐ OG GERIÐ KVETTI
KLÆÐNABÚÐIN
Skálavík • 36 11 34



# Ein kollvelting fyri føroyskt sjálvstýri



*Veðrið í ríkisfelagsskapinum er betri. Rúni Joensen aðalstjóri sigur, at nú verður upp til føroyingar aleina at gera av, um teir vilja yvirtaka málsøki*

**Alt kjak um eina víðkan av heimastýrislógini, sjálvstýrislóg ella nýskipan gerst óneyðugt. Við einari yvirtøkulóg, sum savnar øll donsk og føroysk málsøki í ein pott, gongur heimastýrislógin heilt at loysingini, sigur Rúni Joensen, aðalstjóri í Løgmálaráðnum**

SJÁLVSTÝRI
*Ingi Rasmussen*

Hetta kann kollvelta føroyskan sjálvstýrispolitikk í framtíðini.

Soleiðis sigur Rúni Joensen, aðalstjóri í Løgmálaráðnum, eftir fundirnar millum embætisfólk í danska og føroyska løgmálaráðnum, sum vóru hósdagin og fríggjadagin.

Á fundinum vóru fleiri evni frammi, teirra millum løgregla, rættarskipan og fjølmiðlaábyrgd. Harafturat varð tosað um eitt lógaruppskot frá løgmanni til eina yvirtøkulóg, sum fólk í danska løgmálaráðnum nú fyrireika at leggja fyri Fólkatingið. Væntandi kann uppskotið leggjast fram longu seinni í ár.

Uppskotið savnar øll mál í ein pott. Eisini tey, sum ikki eru nevnd í heimastýrislógini. Nú verða ongar forðingar longur fyri at flyta málsøki til Føroya. Tað verður upp til føroyingar, um vit skulu yvirtaka ella ei.

## Ein uppgerð

Hetta er eitt so mikið stórt framstig, at aðalstjórin í løgmálaráðnum kallar tað eina uppgerð við sjálvstýrispolitikkin higartil.

– Danska stjórnin fær heimild at lata øll málsøki til Føroya. Tað letur upp fyri, at føroyingar kunnu yvirtaka øll málsøki, sum liggja uttan fyri grundlógina. Við hesum verður sjálvstýrismálið flutt til Føroya, og vit sleppa undan einum eljustríði við danir, hvørja ferð eitt mál skal yvirtakast, sigur Rúni Joensen.

Uppi í grundlógini hanga uttanríkispolitikkur, heimarættur, gjaldoyra og hægstirættur.

Bæði Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin hava havt síni boð uppá, hvussu viðurskiftini millum Danmark og Føroyar skulu skipast av nýggjum. Javnaðarflokkurin hevur sína sjálvstýrislóg, og Sambandsflokkurin kallar sína loysn fyri nýskipanaruppskotið. Tey uppskotini eru ikki longur viðkomandi, heldur Rúni Joensen.

– Við hesum leisti, sum nú liggur á borðinum, kunnu vit ikki gera nakra aðra skipan, sum er meira víðfevnd innan fyri ríkisfelagsskapin. Sostatt gerst kjakið um sjálvstýrislóg ella nýskipan kontra heimastýrislóg óneyðugt. Við hesum gongur heimastýrislógin heilt at loysingini, sum onkur hevur nevnt tað, sigur Rúni Joensen, aðalstjóri.

> ” *Við hesum leisti, sum nú liggur á borðinum, kunnu vit ikki gera nakra aðra skipan, sum er meira víðfevnd innan fyri ríkisfelagsskapin. Sostatt gerst kjakið um sjálvstýrislóg ella nýskipan kontra heimastýrislóg óneyðugt. Við hesum gongur heimastýrislógin heilt at loysingini.*
>
> *Rúni Joensen, aðalstjóri í løgmálaráðnum*

## Ikki nýskipan

Høgni Hoydal, landsstýrismaður við lógarmálum, sum umsat sjálvstýrismál síðsta valskeið, hevur staðiliga ávarað ímóti at gera nýggjar skipanir við Danmark, ið ikki byggja á fólkarættarligt grundarlag, tí tað kann merkja eina innliman í ríkið, hevur hann ført fram. Men hann tekur kortini undir við uppskotinum hjá løgmanni, tí talan er ikki um eina útbygging av Heimastýrislógini, sigur hann við Útvarp Føroya.

– Vit hava fingið játtan frá donskum myndugleikum um, at tað er eingin trupulleiki at yvirtaka øll mál – eisini tey, sum ikki eru nevnd í heimastýrislógini. Spurningurin er bara, um tað skal gerast undir einum ella so hvørt. Fyri okkum er tað betri, at tað verður gjørt undir einum. Vit troyta bara Heimastýrislógina til fulnar, og tað ber væl til uttan nakran nýggjan sáttmála, sigur Høgni Hoydal.

Uppskotið hjá løgmanni byggir á semju við danska forsætisráðharran um, at øll mál uttan tey, ið beinleiðis knýta seg at grundlógini, kunnu yvirtakast. Sostatt er líkt til, at føroyskur sjálvstýrispolitikkur loksins fer at snúgva seg um, hvat føroyingar vilja, og ikki hvat danir loyva.

## Fjølmiðlalóg bíðar eftir Fólkatinginum

**Áðrenn nøkur lóg um góðan fjølmiðlasið kann setast í gildi, má Fólkatingið taka undir við at føroyingar yvirtaka málsøkið. Tað var úrslitið av fundinum fríggjadagin millum løgmálaráðið í Føroyum og Danmark. Nú hevur Sambandsflokkurin mist tolið**

FJØLMIÐLAR
*Ingi Rasmussen*

Nógv hava eftirlýst, at Føroyar fáa eina lóg, sum verjir borgaran ímóti fjølmiðlunum. Løgtingsins umboðsmaður fanst soleiðis í Sosialinum herfyri harðliga at myndugleikunum fyri ikki at hava fingið lógina setta í gildi, sum hevur verið ávegis í 10 ár. Men striltið gongst hjá landsstýrinum, sum hevur uppskot klárt.

Sjónarmiðið hjá landsstýrinum hevur verið, at føroyingar hava heimild at lóggeva á økinum, men á fundinum fríggjadagin millum donsk og føroysk embætisfólk gjørdi danska løgmálaráðið greitt, at Fólkatingið skal geva heimildina fyrst. Hetta kemst av, at lóggávan kemur inn á revsilógarøkið, sum er danskt.

Talan verður bara um eina yvirtøkulóg, sum telur tríggjar til fýra reglur, ið Fólkatingið skal samtykkja. Hetta er ikki umfatandi arbeiði, men við teimum royndum, sum føroyingar hava við at bíða eftir donskum lógararbeiði, er greitt, at tað kann draga út. Spurningurin er so, um tað ikki loysir seg at bíða eftir, at ein samlað yvirtøkulóg verður løgd fyri Fólkatingið, ið hevur til endamáls at geva føroyingum heimild at yvirtaka øll málsøki, ið liggja uttan fyri grundlógina.

Sambandsflokkurin hevur mist tolið og hevur lagt uppskot fyri tingið um, at føroyingar seta donsku lógina í gildi. Tað ber ikki til, at eingin fjølmiðlaábyrgdarlóg er, sum hóskar til okkara umstøður, og tí eigur løgtingið at samtykkja at heita á løgmálaráðharran um at seta lógina í gildi fyri Føroyar, sigur flokkurin í viðmerking til uppskotið.

Tað er kortini ivasamt, um Sambandsflokkurin fær undirtøku fyri sínum uppskoti, tí landsstýrið arbeiðir við málinum, og Javnaðarflokkurin hevur eisini sagt, at hann styðjar eina føroyska loysn á málinum.